# samstarva



### India rætta landið

– Men hví fara heilt til India – eru ikki onnur lond tættari upp at okkum, sum vit kundu vitjað og samstarvað við?

– Vit vita, at grønlendingar hava fingið eitt stórt samstarv við Kina, og at Danmark hevur fingið samstarv við bæði Kina og India. Orsøkin til at vit hava valt India framum Kina er tann, at India er kanska meira vesturlendskt, meira opið og málsligi førleikin hevur eisini nógv at siga. India er eisini eitt land, sum er í veldugum búskaparligum vøkstri og sum hevur ein sera stóran dynamikk í nøkrum vinnupørtum, serliga innan KT men sanniliga eisini innan nógvar aðrar vinnur.

Eitt annað, sum er áhugavert við India, er, at landið er ein av heimsins størstu fiskivinnutjóðum. Tey hava eisini eina stóra alivinnu, so tað er kanska eisini ein spurningur um, um tað ber til hjá føroyskum vinnulívi at fáa marknaðarført seg og kanska fáa møguleika at selja nakrar av teimum vørum, sum vit hava útviklað, og tí er fiskivinnan rímuliga væl umboðað í nevndini.

### Vitja víða

Tey vera í India í 10 dagar og fara rættiliga víða um. Byrjað verður í New Delhi, har løgmaður m.a. fær møguleika at hitta nakrar av teimum týðandi ráðharrunum eitt nú uttanríkisráðharran. Síðani verður farið til Bangalore har suðuri India, sum er indiska svarið uppá Silliconvalley. Haðani verður farið til Cochin, sum liggur í útsynningspartinum av India, har fiskivinnan er savnað. Har verður gjørd ein føroysk framløga um føroyska fiskivinnu og føroyskar vørur. Ferðin endar í Bombay.

– Tað eru 20 ár síðani, at Atli Dam, løgmaður fór til India saman við Guttormi Djurhuus vinnulívsmanni at lata upp eina verksmiðju, sum skuldi gera føroyskar bátar. Hvussu kenst tað nú at fara sama veg?

– Tað, sum eyðmerkti Atla var, at hann oftani var nógv frammanfyri síni tíð. Taka vit svartkjaftin, so er júst tað, sum nú hendir umborð á Atlantic Navigator, tað, sum hann droymdi um skuldi eydnast í 80-unum, men tað tók bara 20 ár eyka, áðrenn tað fór at ganga tann rætta vegin. Tað er tað sama, sum ger seg galdandi nú. Eg meti, at tíðin er búgvin til at at fáa bygt upp eitt samstarv við eitt nú India, men tað hevur eisini nakað at gera við, at vit føroyingar blíva ein partur av altjóðagerðini. At vit ikki síggja nokk í okkara egnu fortreffiligheitum men taka upp avbjóðingarnar á líka fóti við onnur. Har haldi eg at Jákup á Dul Jacobsen eisini eigur at vera ein veldug inspiratión til føroyskt vinnulív við at siga, at tað er uttanfyri landoddarnar at vit skulu vinna sløgini og so kunnu koma heimaftur við royndum og møguleikum.

## Luttakaralisti

| Navn | | Heiti | Stovnur/felag | Business area |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Jóannes Eidesgaard | Prime Minister | Prime Ministers Office | |
| 2 | Marjun Hanusardóttir | Permanent Secretary of the PM's Office | Prime Ministers Office | |
| 3 | John Rajani | Director, Department of Strategy and Economic Development | Prime Ministers Office | |
| 4 | Bjørt Samuelsen | Press Secretary | Prime Ministers Office | |
| 5 | Ólavur Ellefsen | Managing Director | Simprentis | IT company (Simprentis develops and delivers training based on web-based learning simulations |
| 6 | Niels Chr. Nolsøe | Managing Director | Elektron | IT company (Banking systems) |
| 7 | Bergur Poulsen | Managing Director | Havsbrún | Fish feed, fish oli |
| 8 | Egil Olsen | Managing Director | FMB | Marine Biotech |
| 9 | Árni Joensen | Managing Director | Faroe Ship | Shipping |
| 10 | Andras Róin | Managing Director | Føroya Tele | Telecommunication |
| 11 | Rúni M. Hansen | Managing Director | Statoil | Oil Exploration |
| 12 | Hans Andrias Joensen | Managing Director | Thor Shipping | Shipping |
| 13 | Janus Petersen | Managing Director | Føroya Banki | Bank |
| 14 | Marner Jacobsen | Managing Director | Føroya Sparikassi | Bank |
| 15 | Tummas Eliasen | Managing Director | LÍV | Insurance |
| 16 | Wilhelm Petersen | Managing Director | Notio | Venture capita |
| 17 | Líggjas í Bø | Managing Director | Tjaldur | Venture capital |
| 18 | Hjalti í Jákupsstovu | Managing Director | Fiskirannsóknarstovan | Fisheries Reasearch |
| 19 | Áki Johansen | Director | Faroe Islands Trade Council | Trade Council |
| 20 | Jóhan Páll Joensen | Chairman | Føroya Arbeiðsgevara Felag | Faroese Employers Assosiation |
| 21 | Magnus Magnussen | Managing Director | Tórshavnar Skipasmiðja | Shipyard |
| 22 | Christian Nagata | Managing Director | Repro Z/Com Data | Advertising, DTP and IT |
| 23 | Høgni Rasmussen | Managing Director | Sansir | Advertising and DTP |
| 24 | Árni Winther | Managing Director | Árni Winther Arkitektar | Architect and designe |
| 25 | Árni Brattaberg | Managing Director | Sirri | Tannery, garnment designe and manufacturing |
| 26 | Jan Mortensen | Managing Director | Vinnuhúsið | House of Industry |
| 27 | Rói Egholm | Managing Director | Farex | Fish processing and trading |
| 28 | Fritleif Olsen | Chairman | Føroya Sparikassi | Bank |
| 29 | Janet F. Johannesen | Managing Director | Atlanticon | Business Consultants |